# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 02. juli 2013

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi og Niels J. Thomsen. Magni Bertholdsen og Jóhan Eli Thomsen vóru burturstaddir.
Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – hetta varð játtað og kemur inn sum mál nr. 5 á skránni.

Fundurin varð settur kl. 16.00.

1. **Umsókn um stuðul til lestrarferð frá Byggitøknilesandi á Tekniska skúla.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 1.000,-.

2. **Umsókn frá Hvalbiar skúla til hátíðarhald í sambandi við 40 ára dagin.**
   Samtykt varð einmælt at lata Hvalbiar skúla kr. 20.000,- til at hátíðarhalda 40 ára føðingardag skúlans.

3. **Skriv frá Sóleyð Nielsen vegna Skúlastýrið.**
   Skúlastýrið spyr um møguleikan fyri at fáa eitt høli í kommunustýrisbygninginum til fundir, eins og goymslu av skjølum v.m. Samtykt varð at geva teimum atgongd til eitt rúm á loftinum.

4. **Innkomin boð uppá jarðarstykki til at heysta.**
   Tvey boð eru innkomin uppá jørð til at heysta:

   | | | |
   |---|---|---|
   | Even Eyvindsson: | Støðlarnar – matr. nr. 390f | kr. 100,00 |
   | Dávur Hentze: | í Sondunum – matr. nr. 145a | kr. 250,00 |

   Samtykt varð at leiga jarðarstykkini til omanfyri nevndu. Samtykt varð at seta ein minstaprís á kr. 500,- pr. jarðarstykki komandi ár.

5. **Uppskot um marknaumskipan millum matr. nr. 145a og 145b, Hvalba.**
   Uppskot í sambandi við ætlanina at gera eina gøtu niðan til Hvalbiar skúla varð viðgjørt, har 145b letur uml. 175 m2 til atkomuvegin, ið eftir ætlan verður 4 m. breiður ímóti at 145a letur 230 m2. Samtykt varð, at báðir partar lata umleið tað sama í fermetrum.

6. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd:**
   - Umsókn um byggiloyvi til garð á matr. nr. 11d.
   - Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 11d.

**7. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Martin í Nesi):**

- Byggiloyvi til garð matr. nr. 11d.
  Samtykt varð at geva byggiloyvi til garð á matr. nr. 11d sambært viðlagdari umsókn, grannaloyvi og givnum upplýsingum.

**8. Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.00